Nr. 25 - 6. februar 2003 Sosialurin 21

## Peugeot 206 mest seldi



Peugeot 206 bleiv aftur í fjør mest seldi persónbilur í Danmark. Hann var framman fyri t.d. Peugeot 307 og Citroën C5.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Sportsvan mest seldi



Toyota Sportsvan var mest seldi vørubilur í Danmark í fjør. Sportsvan er ein vøruvognsútgáva av Toyota Avensis Verso.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Aston Martin



Ford keypti Aston Martin bilverksmiðjuna í 1994. Tað árið seldu teir bert 42 bilar. Í fjør seldu teir 1.500 bilar. Nú eru teir í ferð við at byggja eina nýggja bilverksmiðju í Onglandi. Málið er at selja 5.000 bilar árliga.

*Kelda: Motor Magasinet*




*Designið er ein blandingur av fronskum og japanskum stíli. Bilurin hevur stóra baklúku, og viðførisrúmið kann gerast størri við at flyta baksetrið fram.*

# Nýggjur Nissan Micra á veg




*Nissan Micra verður enn sum áður gjørdur við 3 og 5 hurðum. Bilurin er bygdur yvir sama plattform sum ein komandi Renault Clio.*



*Micra hevur nýggja "Keyless-Go"systemið, har bilførarin uttan at taka lykilin úr lummanum kann læsa seg inn í bilin, starta motorin og koyra avstað*

**Nýggjur Nissan Micra er á veg. Micra er fyrsta evropeiska úrslitið av samstarvinum millum Renault og Nissan. Bilurin er ein blandingur av japanskum og fronskum designi og koyrieginleikum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Navnið er tað einasta, ið nýggi Nissan Micra hevur til felags við forgangaran. Hóast bilurin er 4 cm styttri enn forgangarin, er hann bæði hægri og breiðari, og harvið verður meira pláss í kabinuni. Baksetrið kann flytast aftur og fram, men tað ávirkar sjálvsagt plássið í viðførisrúminum. Micra hevur nýggja "Keyless-Go"systemið, har bilførarin uttan at taka lykilin úr lummanum kann læsa seg inn í bilin, starta motorin og koyra avstað. Eisini hevur bilurin "battarísikring" sum tryggjar at ljósið inni í bilinum søknar eftir 10 min. ella 2 tímum, alt eftir hvat tað er stillað til. Hetta er fyri at tryggja, at bilurin ikki stendur uttan streym, um eigarin hevur gloymt at sløkt ljósið. Micra kemur við trimum bensinmotorum við ávikavist 65, 80 og 88 hk og turbo-dieselmotorum við 65 og 82 hk. Bilurin verður gjørdur á Nissan bilverksmiðjuni í Sunderland í Onglandi.




*Nýtt ungdómsfelag er stovnað í Runavík. UHF er heitið. Súsanna Thomassen, Bogi Steingrund, Helena Johannesen, Barbara Tórunnardóttir, Amon Ellingsgaard og Sámal Einarsson eru stigtakarar, sum skipa fyri, at sluppin Høganes, sum liggur við kei í Runavík, skal gerast eitt tilhaldsstað hjá teimum ungu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Betra um ungdómskarmarnar í Runavík

**UHF er heitið á nýggjum felag, sum júst er sett á stovn í Runavík. UHF stendur fyru Ungdómsfelagið Høganes. Hetta felagið hevur sett sær sum mið at betra um karmarnar hjá teimum ungu í kommununi**

UNGDÓMSFELAG
*Ingrid Bjarnastein*

Nýggja ungdómsfelagið í Runavíkar Kommunu eitur UHF, sum stendur fyri Ungdómsfelagið Høganes. Felagið hoyrir undir felagið Høganes.

Stigtakarar eru ung úr framhaldsdeildini í Runavíkar skúla, sum hava sett sær fyri at brúka sluppina, Høganes sum savnistað fyri tey ungu í kommununi. Har er ætlanin, at tey ungu skulu halda til tríggjar dagar um vikuna. Mánadag, mikudag og fríggjadag. Mána- og mikudag frá klokkan 19 – 22.30 og fríggjadag til klokkan 01.

Orsøkin til, at felagið er sett á stovn er, at eitt stað vantar í kommuni, har ungdómurin kann halda til.

Frá ungdómsfelagnum sigat ey, at tað verða vanlig spøl, tónleikur, videokvøld á skránni, og harafturat ætla tey at skipa fyri tiltøkum fyri almenninginum.

Runavíkar Kommuna hevur játtað at hjálpa teimum ungu við at koma í gongd, millum annað við spølum og anleggi. Annars gjalda tey onki fyri at vera umborð á Høganesi. Tað einasta felagið krevur afturfyri er, at sluppin verður hildin rein, tí høvuðsendamálið er, at sluppin verður nýtt til nakað gott.

Ungdómsfelagið hevur eisini gjørt nakrar viðtøkur, ið skulu góðkennast á aðalfundinum, sum verður í næstum. Millum annað tað, at tað skal vera rús- og roykfrítt umhvørvi umborð á sluppini.

Eisini verður ein lítil kiosk, sum ungdómsfelagið skal umsita.

Stigtakararnir, sum eru Súsanna Thomassen, formaður, Bogi Steingrund, næstformaður, Helena Johannesen, skrivari, Barbara Tórunnardóttir, kassameistari, Amon Ellingsgaard, nevndarlimur og Sámal Einarsson, nevndarlimur, vænta, at undirtøkan fer at vera góð.

